# Neistin vann greitt í grannauppgerð

Kvinnurnar hjá Neistanum vunnu ein greiðan sigur, tá ið tær týskvøldið leiktu grannauppgerð móti Kyndil á Hálsi. Úrslitið var ein tryggur 31-17 sigur, eftir at Neistin í hálvleikinum var á odda 11-7.

Kyndil fylgdi væl við rættuliga leingi, og bert eitt korter fyri leiklok vóru einans trý mál á muni. Men seinasta korterið gjørdi Neistin bart og skoraði ikki færri enn 13 ferðir, meðan Kyndil einans fekk mál tvær ferðir hesa løtuna.

**Neistin-Kyndil 31-17(11-7)**
**Neistin:** Simona Petersen 10, Annika Thomsen 8(1), Lív Sørensen 6, Marjun Tróndarson 4(1), Ása á Neystabø 2, Kára á Dunga 1
**Kyndil:** Ann-Mari Wang 8(4), Súsanna Petersen 3, Randi Wardum 3(1), Hildur Høghamar 2, Linda Weihe 1
**Útvísingar:** Kyndil 2
**Dómarar:** Hartvig Joensen og Poli Hansen
**Áskoðarar:** 25

**tn**

# Hagtølini

| | 04 | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | 96 | 95 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| VB-ÍF | 3-1 | - | - | - | - | 3-1 | 1-1 | 2-0 | 2-1 | - | 4-1-0 | 11-4 |
| GÍ-EB/S | 1-3 | 3-3 | 3-0 | 4-0 | - | - | - | - | - | - | 2-1-1 | 10-6 |
| Skála-TB | - | - | 8-0 | - | - | - | - | - | - | - | 1-0-0 | 8-0 |
| KÍ-HB | 1-1 | 1-2 | 3-2 | 0-2 | 1-2 | 0-0 | 2-2 | 0-2 | 0-1 | 2-0 | 2-3-5 | 10-14 |
| B36-NSÍ | 1-1 | 2-0 | 1-3 | 1-0 | 5-0 | 3-2 | 2-0 | 3-2 | - | 1-0 | 7-1-1 | 19-8 |

Fortíðin hevur lítið at siga, tá lagt verður fyri til fyrsta umfar. Øll lið eru jøvn undan dystarbyrjan, og spurningurin er so, hvør fer avstað við stigunum hesaferð.

Og hóast alt, so geva hagtølini ofta greiðar ábendingar á, hvussu tað plagar vanliga um sera tættar dystir í Klaksvík, tá HB vitjar, og seinnu árini hava víst, at EB/Streymur hevur staðið seg alt betri í Gøtu.

Talvan sýnir, hvussu mótstøðuliðini sunnudagin hava staðið seg, tá tilsvarandi dystir hava verið á skránni seinastu tíggju árini.

**-jm**

# Søljan vann stórsigur

Ein útsettur dystur í Sunset-kappingini hjá kvinnum var leiktur á Giljanesi týskvøldið. Dysturin var millum Søljuna og Tjaldur, og heimaliðið vann stórsigur.

Úrslitið av dystinum var 46-7 til Søljuna, sum í hálvleikinum var á odda 20-4. Dysturin staðfesti enn einaferð stóra munin á fleiri av liðunum í fremstu kvinnudeildini í hondbólti. Søljan liggur í ovaru hálvu á stigatalvuni, meðan Tjaldur er greitt botnlið.

**Søljan-Tjaldur 46-7(20-4)**
**Søljan:** Nicoleta Radu Hansen 17(1), Lina Andriulyte 8(1), Heidi Maria Akselsen 6, Fía Selma Nielsen 4, Hertha J. Simonsen 4(1), Arnleyg Haraldsen 3(1), Kristianna Petersen 2(1), Una á Steig 1, Erla Samuelsen 1(1)
**Tjaldur:** Anna Hansen 3, Jacoba Langgaard 2(2), Heidi Sevdal 2
**Útvísingar:** Søljan 4, Tjaldur 7
Dómarar: Hannis og Uni Wardum
**Áskoðarar:** 58

**tn**

## SUNSET KAPPINGIN
KVINNUR

| | dystir | v - j - t | vu. mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 7 | 7 - 0 - 0 | 686 | 415 | 271 | 27 |
| 2 Stjørnan | 7 | 6 - 0 - 1 | 581 | 407 | 174 | 25 |
| 3 Neistin | 7 | 5 - 0 - 2 | 596 | 442 | 154 | 20 |
| 4 Søljan | 7 | 4 - 0 - 3 | 566 | 484 | 82 | 16 |
| 5 VÍF | 6 | 2 - 0 - 4 | 469 | 460 | 9 | 9 |
| 6 StÍF | 6 | 1 - 0 - 5 | 442 | 532 | -90 | 7 |
| 7 Kyndil | 7 | 2 - 0 - 5 | 414 | 576 | -162 | 7 |
| 8 Tjaldur | 7 | 0 - 0 - 7 | 302 | 740 | -438 | 0 |


HALDIÐ SOSIALIN






TEKNA TEG SUM HALDARA **NÚ.**
**450 kr** UM ÁRSFJÓRÐINGIN
-SPARIÐ **395 kr** Í MUN TIL LEYSASØLU

950,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(650,- kr. fyri 1 ferð um vikuna · 5 bløð)

Sosialurin | ARGJAVEGUR 26 · P.O.BOX 76 · FO-110 TÓRSHAVN · TEL 34 18 00
FAX 34 18 01 · POST@SOSIALURIN.FO · WWW SOSIALURIN.FO

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ______

Bústaður: ______

Postnr.: ______

Bygd/býur: ______

Telefon nr.: ______

Undirskrift: ______

Ókeypis
Verður sent óþostað
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Sosialurin 341800